## Tiger eingin sølumaður

Hóast Tiger Woods var heimsins besti golfspælari, tá hann var við í lýsingum fyri amerikanska bilmerki, Buick, er hann neyvan tann stóri sølumaðurin – í øllum førum ikki, um vit skulu trúgva nevndarliminum í General Motors, Bob Lutz. Hann sigur, at lýsingarnar neyvan góvu økta sølu, men at teir í Buick kanska eisini høvdu sín part av skyldini, tí Tiger Woods ikki fekk tað besta handritið, tá orðini skuldu leggjast honum í munnin.



## Vil hava Cole kláran

Vinstri bakkur hjá Chelsea, Ashley Cole, var fríggjadagin lagdur undir skurð, og væntandi ganga tríggir mánaðir, áðrenn brotni fótliðurin er í lagi aftur. Kortini vónar landsliðsvenjarin hjá Onglandi, Fabio Capelli, at Cole kemur so mikið væl fyri seg, at hann kann koma við til HM í Suðurafrika. Ongland spælir fyrsta dystin 12. juni, so har skal altso ganga skjótt við framgongdini hjá Cole, skal Capello fáa sítt ynski uppfylt.




Tað bleiv givið og tikið allan vegin í brakdystinum millum kvinnurnar hjá Mjølnir og Drátti í Klaksvík í gjár
Mynd: Oliver Joensen/Norðlýsið

### Mjølnir-Dráttur 3-0 (28-26, 27-25, 25-22):

# Eitt brak av einum dysti

**Hvørki Mjølnir ella Dráttur vildi geva seg, so tí gjørdist talan um tveir javnbrótarar og eitt tætt sett, áðrenn Mjølnir at enda hevði vunnið dystin, ið var spennandi frá byrjan til enda**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Undan dystinum vóru øll greið yvir, at nógv stóð upp á spæl, tá Mjølnir í gjár tók ímóti Drátti í Badmintonhøllini í Klaksvík. Og tað sást eisini aftur á vøllinum, har bæði liðini góvu seg fult út í royndunum at vinna, tí taparin kundi næstan við vissu avskrivast í kappingini um at koma í FM-finalurnarnar.

Mjølnir, ið til fyri kortum sat á næstfremsta plássinum á stigatalvuni, vann hesa avgerandi uppgerðina, men hóast endaliga úrslitið segði 3-0, so var talan um ein dyst, ið helst var javnari og meira spennandi enn nógvir fimmsettarar kunnu vera tað.

Tvey tey fyrstu settini leikaði sera javnt á, og í báðum førum var neyðugt við javnbrótara, áðrenn Mjølnir hevði tikið settini. Og heldur ikki í triðja setti vildi Dráttur geva seg, so har gjørdust bara trý stig á muni, tá samanum kom. Fyri Mjølnir merkti sigurin, at liðið framvegis er væl við í kappingini um at koma í FM-finalurnar, samstundis sum Dráttur í veruleikanum misti sín kjans.

### Øgiliga javnt

Tað var øgiliga javnt í fyrsta setti, har ongantíð meira enn tvey stig vóru á muni. Bæði lið vunnu síni álop, meðan blokkarnir kanska ikki fingu fatur í so nógvum. Men í avgerandi løtuni var tað ein av ungu spælarunum hjá Mjølnir, Poulina Øregaard, ið syrgdi fyri settinum. Tað stóð á jøvnum 26-26, tá hon kom inn at serva, og púra køld legði hon fyri við einum servuessi, og síðani vann Mjølnir næsta bóltin og settið.

Í øðrum setti var tað Dráttur, ið hevði hug at byrja betur. Vágakvinnurnar vóru mitt í settinum á odda 12-16, og tað var ikki fyrr enn heilt ímóti endanum á settinum, at Mjølnir slapp framum. Enn eina ferð hevði Poulina ein leiklut í síðstu servunum, og aftur í hesum settinum mátti spælast upp um tey 25 stigini, áðrenn avgerðin var fallin.

Mjølnir fekk betru byrjanina í triðja setti og kom framum við fimm stigum. Men Dráttur fylgdi tó væl við, so eisini her gjørdist talan um eitt rímiliga javnt sett, sum Mjølnir at enda vann við trimum settum.

Samanumtikið átti Mjølnir munin í dystinum, tí liðið hevði fleiri streingir at spæla uppá og fekk variera álopsspælið meira. Hevarin hjá Drátti, Maja Popovic, fekk ikki tað sama burturúr sum í fleiri av undanfarnu dystum, tí hon hevði størri spælarar ímóti sær hinu megin netið.

Sigurin ger, at Mjølnir framvegis er væl við, meðan Dráttur við tapinum ikki longur ein veruligan møguleika at koma í FM-finalurnar.

### Fleyr-KÍF 3-0 (25-10, 25-15, 25-6):

## Fleyr á føtur aftur

Eftir at hava tapt fýra av teimum síðstu fimm dystunum, komu kvinnurnar hjá Fleyr á føtur aftur í gjár, tá tær á heimavølli í Gundadalshøllini vunnu á KÍF. Hetta er ov seint til at røkka nakað FM-finalupláss, men um alt gongur eftir vild í allarseinastu dystunum, kann tað kanska røkka til heiðursmerki hjá Fleyr.

Spælið hjá Fleyr í gjár var gott. Álopsspælið koyrdi væl við nógvum ígjøgnum miðjuna, umframt at móttøkurnar vóru góðar og talan sum heild var um fáar feilir. Við tí fólki, Fleyr hevur, er ikki lætt at vera fyri, tá spælið koyrir, og tí gjørdist tað eisini til ein sera sannførandi sigur.

Tær ungu KÍF-kvinnurnar royndu av øllum alvi at stríðast ímóti, men yvirmaktin var ov stór. Tær hjá KÍF royndu seg meira við sløgum, enn tær kanska hava gjørt, og í løtum spældu tær heilt væl, men við hesi mótstøðuni gav tað kortini ikki nakað.

hil

## Bara TB og Mjølnir eftir

Alt kappingarárið hevur SÍ verið fremsta liðið í Eik-liguni hjá kvinnum, og so hava fleiri kappast um at runnið aftaná. Nú kappingin nærkast endanum, eru bara tvey lið eftir, ið mugu sigast at vera við í stuttligasta partinum av kappingini, sum er heilt har frammi.

TB hevur ein fyrimun, tí liðið er á næstfremsta plássinum, eitt stig framman fyri Mjølnir, umframt at TB hevur spælt ein dyst minni. Sostatt røkist í løtuni mest fyri, at tað verður TB, ið sleppur at spæla FM-finalu ímóti Mjølnir.

Men framvegis er Mjølnir væl við. Kortini eru treytirnar eitt sindur harðar, tí samstundis sum Mjølnir skal vinna allar sínar írestandi dystir, skal TB tapa tveir.

So hóast næstbesta feltið ikki er so stórt, sum tað eitt nú var síðsta kappingarár, er lív enn í kappingini, har TB og Mjølnir til tað síðsta koma at kappast um seinna finaluplássið.

hil